

*Kristian Blak hevði umhugsað at biðið sonin Sámal um at gera eina eyka Planet til sín, men slapp nú undan*

# Herðaklappið hjá Kristian

Maðurin aftan fyri 250 føroyskar tónleikaútgávur seinastu 28 árini, Kristian Blak, fekk serliga Planet Herðaklappið. Hetta var ordiliga skeg heldur Kristian.

**PLANET AWARDS**
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tað var ein fegin Kristian Blak, ið fekk Planet Herðaklappið á Planet Awards leygarkvøldið. Men eisini konan Sharon var glað, hon segði, at hon hevði ynskt sær eina Planet heiðursløn at stilla á hyllina í stovuni. Tað er nevniliga sonur Kristian og Sharon, Sámal og vinmaður hansara David Geyti, ið hava gjørt snotiligu planetirnar. Sharon var tó serliga glað vegnað Kristian, tí hon helt mann sín hava uppiborið eitt tílíkt herðaklapp fyri sítt arbeiði fyri føroyskan tónleik, og hvør man vita tað betur enn júst konan hjá hesum arbeiðssama manni.

Kristin segði í spølni, at honum hevði dámt planetina so væl, at hann hevði hugsað um, at biðið Sámal um at gera eina eyka planet, sum tey kundu fáa hetta pena listaverk. So tað er bara gott, at eg vann eina heldur Kristian.

Hann er stoltur av, at Sámal bleiv biðin um at gera planetirnar: "Hann er ein dugnaligur drongur. Hann hevur gjørt eitt stórt og gott arbeiðið við planetunum, og man gleðist jú tá onkur í familjuni ger nakað serligt".

Kristian sigur annars, at hann gjørdist ikki sørt kløkkur, tá Jan Müller nevndi hansara navn av pallinum. "Hatta var eitt ordiligt yvirraskilsi - Men tað var samstundis skeg at hoyra, fólk rópa mítt navn, tá eg kom á pallinum.", sigur Kristian.

Kristian hevur virkað í føroyska tónleikaídnaðinum síðan 1974 og hevur nærum øll árini verið ein slóðbrótari. Spurdur um menningina í føroyskum tónleiki seinastu 32 árini, sigur Kristian, at menningin hevur verið sera stór, bæði í tali og í góðsku á útgávum. Kristian byrjaði sum útgevari í 1977 og tey 18 árini fram til 1995, gav TUTL 50 útgávur út. Seinastu 10 árini hevur felagið givið út fleiri enn 200 fløgur. Kristian heldur, at tvinnar høvuðsorsøkir eru til hetta. Digitaliseringin hevur gjørt sjálvt arbeiðið við at gera fløgur munandi lættari. Hin orsøkin er broytingin innan føroyskan popp- og rokktónleik fyrst í 90'árunum. Bólkar fóru frá at spæla løg hjá øðrum til at spæla egið tilfar, at hesum sprottu nógvar útgávur.

Kristian heldur eisini, at serliga seinastu árini er nógv hent við góðskuni á útgávunum, tónleikararnir eru á høgum støði og hava nógvan sjálvkritikk. Hetta hevur havt við sær, at nakrar sera góðar fløgur eru komnar út. Kristian sigur, at avbjóðingin hjá TUTL, nú liggur í at liva upp til ábyrgdina, ið tann høga góðskan leggur á herðarnar á felagnum. Planet Awards gjørdist eitt sera gott kvøld hjá TUTL, við hópin av nøvnum í uppskoti og fleiri í millum vinnararnar.

Ein av bólkunum, ið hevur givið eina góðsku fløgu út á TUTL í 2005, er 200. Mikael sonur Kristian spælir bass í bólkinum. 200 vann planetina fyri besta bólk. Kristian er sera glaður fyri, at Mikael fekk hendan heiður, men eisini vegna Niels og Una. Tí teir spæla øgiliga væl og hava givið eina sera góða fløgu út, ið hevur sligið navnið hjá 200 fast, sigur Kristian.

# Poppkorn fein

**Gentubólkurin Poppkorn, ið hevur tikið serliga tey ungu í Føroyum á bóli, vann heiðurin og Planetina sum besti nýggi bólkur við Planet Galla kvøldið farna leygarkvøld**



**PLANET**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

– Tað var ófatuliga stórt. Eg haldi vit fataðu tað ikki fyrr enn dagin eftir.

Soleiðis sigur Lillian úr Poppkorn, tá vit ringja til hennara mikudag og hon hevur havt tíð at koma niður á jørðina aftur, eftir at hava sveimað millum planetirnar.

Tað vóru fleiri stór og góð nøvn í uppskoti til besti nýggi bólkur.

– Vit høvdu slett ikki væntað hetta. Ongin av okkum hevði hugsað hetta. Tað er stórt at vinna og hetta ger, at vit verða minstar aftur og ikki minst hevur hetta ávirkan á eftirspurningin

